# *Summar – summar – summar!*

So er summarið í hæddini, skúlar eru farnir í summarfrí, og fólk spjaðast í ymsar ættir fyri at halda frí. Tað er ein tryggleiki at vita, at vit øll hava rætt til at halda summarfrí, og hóast vit ikki hugsa um tað, so er tað ikki ein sjálvfylgja, at so er; nógva staðni í heiminum hava fólk als ikki rætt til summarfrí. Men vit eru so von við hesi rættindi, at vit hugsa ikki um tað øðrvísi enn, at tað er ein sjálvskrivaður rættur.

Men tað hevur týdning fyri okkum øll, at okkara Guds lív ikki fer í summarfrí. Eitt er at virksemið í samkomuni verður lagt stilt meðan summarið er, og at vit ikki fáa luttikið í teimum ymisku uppgávunum í samkomuni, tí vit fara t.d. at ferðast, men eins og vit ikki lata vera við at eta mat tá vit eru í summarfrí, so er líka neyðugt fyri okkum, at fáa andaliga føði eisini tá vit halda summarfrí. Hetta er ikki fyri at gera Gud nøgdan við okkum – tað er Hann. Nei hetta er eins og við likaminum, fyri at vit hava styrki og trívast allar dagar í árinum.



Eg vil fegin signa teg og tykkara familju, og tala Guds stóru og ríku náði yvir tykkara lív, so tit fáa eina avbera góða summarfrítíð. Eg vil eggja teg til at lata nærveru Guds vera um teg altíð. Forsøm ikki at lovsyngja og tilbiðja, tí tað kunnu vit altíð gera og tað ger allan munin fyri okkara andaliga persón. Eg ynski fyri teg, at tú kanst vitna: Tín góðska fylgir mær, hon floymir yvir meg.

HARRIN signi teg og varðveiti teg! HARRIN lati andlit Sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur! HARRIN lyfti ásjón Sína yvir teg og gevi tær frið!

*tj*

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

*Samkomuleiðslubólkurin*

Filadelfia
*„Himmal á jørð“*

# Hon er altíð nýggj



„Mamma,“ segði ein lítil genta ein dagin, „hvat fert tú at gera tá ið tú hevur lisið alla Bíbliuna?“ Hon sá, at mamman flutti bókamerkið hvørja ferð hon hevði lisið.

„Tá byrji eg av nýggjum,“ segði mamman.

„Men tú veitst alt, sum stendur í Bíbliuni. Tá ið tú hevur lisið aðrar bøkur, leggur tú tær frá tær og byrjar at lesa okkurt annað. Hví skalt tú lesa Bíbliuna fleiri ferðir?“

„Tí hon er altíð nýggj,“ svaraði mamman.

Sjálvt um vit granska Bíbliuna alt lívið, verða vit ongantíð liðug við hana. Hon er sum ein kelda við frískum, rennandi vatni, sum vit altíð kunnu drekka av. Har er alt okkum tørvar. Vit gera væl í at taka ímóti orðinum við allari vælvild og rannsaka dagliga skriftirnar fyri at síggja, um tað, vit uppliva samsvarar við Orð Guds. Sálmur 119,105 sigur: „Orð Títt er fóti mínum lykt og ljós á leið míni.“ og 119,130 sigur: „Tá ið orð Tíni verða upplatin, geva tey ljós; tey geva einfaldum vit.“ Og í Jeremias 15,16 lesa vit: „Eg fann orð Tíni, og eg át tey; orð Tíni vóru mær til frøi og hjarta mínum til gleði; tí eg eri kallaður við navni Tínum, HARRI Gud herskaranna!“

Ein sangur sigur so í einum ørindi: Orðið um krossin boðar tær frið, trygt Orðið er, altíð tað ber. Lyftini halda, takk honum sig, trúgv so sum skrivað er.

## BARNAMØTINI

**byrja aftur 30. aug. kl. 11.30**

# JULI 2026

| | | |
|---|---|---|
| Leygardagur | 4. | **Reingerð:** Eyðbjørg |
| Sunnudagur | 5. Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>Møti- og kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður<br>Ábyrgd/leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J.<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: |
| Mánadagur | 6. Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Ása O. |
| Mánadagur | 13. Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd: Anna |
| Mánadagur | 20. Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna-May |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.



# Góða summarferiu

Nú summar er í hondum og vit fara í feriu, vera tað færri møtir í juli. Tá er gott at vita, at vit hava ein faðir í himli, ið ongantíð fer í feriu.



Vit lesa í Sálm. 91,11-12:
*Tí Hann gevur einglum Sínum boð um at varðveita teg á øllum vegum tínum; teir skulu bera teg á hondum, so tú skalt ongum steini sláa fótin ímóti;*

Guds trúfesti er ikki tengt at, at vit eru á møti, nei Guds trúfesti er við okkum allastaðni har vit eru. Um vit eru heima, ella um vit fara at ferðast í fremmand lond, er Hansara trúfesti har, so at vit kunnu kenna okkum trygg á øllum okkara leiðum.



Vit syngja í einum sangi soleiðis:
*Gangi eg um heiðar fjøll og dalar,*
*fylgir vinur mær eg hoyri Hann.*
*Tó ósjónligur Hann til mín talar,*
*troyst og revsing sum mær tørva kann.*
*Tað er Hirðin sum mítt hjarta eigur,*
*sum breyt deyðans vald á foldum her,*
*Hann, sum seyð Sín røktar, føðir, leiðir,*
*og sum ævigt trúgvur er.*

Veruleikin er, at Hann er við okkum á øllum okkara leiðum.

Mangan er tað soleiðis, at vit á undurfullan hátt uppliva, hvussu alt lagar seg til tað besta fyri okkum, vit hugsa ikki altíð um, hvussu tað ber til, ella hvussu tað hendi.

Men sum tað stendur í Sálmi 91, Hann gevur einglum Sínum boð um at varðveita okkum á øllum vegum okkara. Hetta er stórt, og mangan skilja vit ikki stórleikan í Guds orði, fyrrenn vit uppliva ymiskt á okkara vegi, har vit síggja, at tað ið hendi, einans kundi henda, tí Hann er trúfastur og varðveitir okkum á øllum leiðum okkara.

5. Mósebók 32,11 sigur soleiðis: *Sum ørnin vekur reiður sítt og sveimar yvir ungum sínum, soleiðis breiddi Hann út vangir Sínar, tók hann upp og bar hann á flogfjaðrum Sínum.*

Um vit øll hugsa um Guds trúfesti í okkara lívi, rokni eg við, at tað hevði fylt nógvar bøkur, alt tað vit uppliva við Harranum. Onkuntíð verður alt ikki soleiðis, sum vit høvdu ætlað ella vónað, men Hansara trúfesti verður ongantíð burtur.

Tá tú hevur givið títt lív til Jesus, kann einki saka teg. Hvørji álop, ið enn koma á títt likam ella tína sál, kunnu ikki røra við tað, at tín andi er endurføddur.

Tað sum er innast í mínum anda, er millum meg og Jesus, og tað kann eingin nerta við.

Tá eg veit hetta, kann eg við dirvi ganga inn í tað, ið Harrin hevur lagt fyri framman.

Nøkur fara í onnur lond at lesa, eisini har er Guds trúfesti og varðveitir Hann okkum á øllum okkara leiðum.

Vit vilja ynskja tykkum øllum eina góða summarferiu, við Guds ríku signing, og vit gleða okkum at halda fram at byggja samkomuna saman við tykkum.

Góða summarferiu til tykkum øll.

*Anna-May og Nomi*

